# Kann eg bjóða tygum fólkayvirlitið?

**KRONIKK**
*Einar Már Guðmundsson*

Ein krönika um ein mannaátara ljóðar nakað soleiðis: Ein mannaátari flýgur á fyrsta klassa. Flogternan ber honum matkortið, prýðiligt og við fleiri valmöguleikum. Mannaátarin er höviskur, men tað eru teir flestir, sigst, soleiðis at byrja við. Mannaátarin hyggur gjøgnum kortið og sigur so við flogternuna: Hetta sær mær eitt sindur soltið út. Hövdu tygum ikki heldur viljað borið mær ferðafólkalistan?

Nú ætli eg mær ikki at gera ríkmenninar í Íslandi, ið saman við myndugleikunum hava gaddgrivið okkum landið, til mannaátarar, ikki í bókstaviligari merking, men kortini kenst tað ikki sört, sum at teir, eftir at hava fingið at kalla alt upp í hendurnar, bankar sum ríkisfyritøkur, sögdu við myndugleikar og eftirlitsstovnar: Nú er tað besta farið á hesum matkortinum. Hövdu tit ikki viljað rætt okkum fólkayvirlitið?

Og landsmyndugleikarnir fóru í heyst upp í eitt váðaspæl, eina russiska rulett, og avleiðingin er, at umdømið hjá einari heilari tjóð er spilt – og vit, sum vóru so stolt og mangan ikki áttu annað enn stoltleikan. Tær neyðars gomlu tjóðhetjurnar, stríðsmenninir úr 19. öld, nú standa teir eftir sum standmyndir vetrargjóstrinum. Hvar er franski kollveltingarandin og  týska romantikkin, nú ið yvirgangslógir eru beittar á okkum og vit mugu dusa okkum saman við illgitnastu samfelagsskipanum í heiminum og ríkisleiðarum, sum eingin leggur í at hitta í myrkri.

Hvør Osama Bin Laden er í hesum samanhanginum, skal eg ikki siga, men fleiri av ríkiskroppunum eru rýmdir av landinum, so eingin fær fatur í teimum – ella koyra teir um göturnar við lívverjum. Eg fari heldur ikki at leggja nakran javnt við feðgarnar báðar Kim Yong Il og Kim Il Sung, men eri kortini ivaleysur í, at myndugleikarnir og eftilitsstovnarnir undir teimum svaraðu pengamonnunum soleiðis, tá ið teir bóðu um fólkayvirlitið: Ja, gerið so væl og sigið endiliga frá, um vit kunnu gera tykkum onkran beina afturat!

Hetta er sjálvandi einki minni enn landasvik, um tað orðið hevur nakra merking longur, og tað er  tí eitt treytaleyst krav frá okkum, sum einki eiga uttan okkum sjálv og börn okkara, at ognirnar hjá pengamonnunum verða frystar alt fyri eitt, og at skipanin gevst at kanna seg sjálva. Almenningurin vil, at Fíggjareftirlitið verður koyrt frá og at aðrir eftirlitsstovnar verða kannaðir; eisini Tjóðbankin og stjórnin fyri alt tað. Fólk, sum hava havt ágóða av oyðslinum, verða nú sett at kanna oyðslið, og fíggjarspillingin røkkur heilt inn í stjórn landsins, men vit sita hinvegin eftir við einari risastórari rokning, upp á tólvtúsund milliardir (ísl.) krónur, og roknað verður við, at vit gjalda, vit, börn okkara, barnabörnini og enntá barnabarnabörnini eisini.

Eg kundi hildið fram at reksa upp og reksa upp, men leggi ikki í,  tað er eitt níðingsverk, sum er framt og politikararnir vóru vitandi um tað, tað vóru teir, sum einskildu bankarnar, góvu satt at siga nærvinum sínum teir, ja lótu teir upp í hendurnar á okurkallum, sum síðani hava veðsett okkum langt fram í tíðina og sett fólkið á biddarasessin hjá Altjóða Gjaldoyrisgrunninum og öðrum lánistovnum.

Vit eru gíslar á lögreglustöðini hjá heimskapitalismuni, tí at rokningin, sum lá eftir á matstovu hennara, var so stór, at eingin hevur ráð at gjalda hana, men stjórnin, sum sat til fyri kortum, segði ikki sum teir sálarsjúku í Einglum alheimsins: Vit eru öll saman á Kleppi (t.e. gamla sinnissjúkrahúsinum í Reykjavík). Tað hevði eisini verið ov gott til at vera satt. Nei, stjórnin segði: Fólkið skal gjalda. Vit kroysta pakkið. Ja, stjórnin var líka ábyrgdarleys sum jassarnir í áðurnevndu sögu, ið fóru á fínt hotell og ótu og drukku, hóast teir ikki áttu fyri eitt glas av vatni. Munurin er bara, at frá jassunum í söguni hevði samfelagið tikið alla ábyrgd,  stjórnin afturímóti varð vald til at hava ábyrgd.

...

Ein álítandi búskaparfrøðingur, sum varaði okkum við undan skrædlinum, sigur, at íslendska stjórnin og Tjóðbankin eru ikki betur skikkað til at standa fyri einum nútíðarbúskapi, enn til at fáast við stjörnuvísindi. Hvørki stjórnin ella Tjóðbankin skiltu, at uppsveiggið í íslendska búskapinum í 2005 0g 2006 stóðst av stöðugt vaksandi skuldbinding – lán vóru tikin til gjalda av öðrum lánum við – og nú veit hvørgin, hvussu javnvág skal fáast aftur, nú alt pappírsríkidømið er farið fyri hund og ravn.

Og búskaparfrøðingurin leggur